# ConocoPhillips kann vinda pening úr Ekofisk fram til 2028

**Tað norska Norðsjóvar olju ævintýrið átti eftir bókini at verið liðugt men nýggj tøknifrøði hevur ferð aftan á ferð víst at olju- og gasskeldurnar eru størri enn mett varð – samstundis sum útvinningar ratan er økt**

OLJA & GASS
*Búi Tyril, tyril@PRnewsMedia.com*

Tann stóri slóðbrótarin í Norðsjóvar oljuni, amerikanska oljufelagið ConocoPhillips fær framvegis góðan vinning burtur úr Ekofisk og øðrum feltum um somu leiðir, hóast tað nú eru liðin meira enn 30 ár síðani framleiðslan kom í gongd har. Aftan á stórar undirmetingar av olju- og gassnøgdunum í umráðnum, eru spádómar fleiri ferðir gjørdir til skammar av nýggjum og óvæntað fundum, væl hjálpt av nýggjari tøknifrøði sum hevur kunnað hækkað útvinningar ratuna í framleiðslufeltum.

Mett út frá framleiðslu operatørskapi er ConocoPhillips Norge triðstørsta oljufelag í Noreg. Felagið er operatørur í sjey framleiðslu loyvum og eigur lut í 25 øðrum loyvum á tí norska landgrunninum. Í 1969 fann felagið tað gigantiska Ekofisk feltið og framleiðslan har kom í gongd í 1971. Enn tann dag í dag er Ekofisk ein tann størsti framleiðarin á tí norska landgrunninum. Í 1980 vóru sjey felt í framleiðslu á Ekofisk leiðunum og tað áttanda, Embla, kom afturat í 1993.

ConocoPhillips fór í 1998 undir framleiðslu av olju og gassi gjøgnum Ekofisk II, ein risastór nýútbygging av tí upprunaliga Ekofisk Komplexinum.

»Nýútbyggingar hava spart munandi upp á rakstrar útreiðslur,« sigur Lars A. Takla, stjóri í ConocoPhillips Norge. »Ekofisk II fer at gera okkum før fyri at framleiða við vinningi í tí norska partinum av Norðsjónum fram til í minsta lagi 2028.«



*Við Onshore Drilling Center kunnu ConocoPhillips fjarstýra stórum pörtum av arbeiðinum á boristöðum.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

## Spræna vatn og víðka

Tað Størra Ekofisk Økið norsku megin markið bestendur nú av fýra framleiðslu feltum: Ekofisk, Eldfisk, Embla og Tor. Meira enn 10 prosent av Noregs samlaðu olju- og gassframleiðsu kemur haðani.

Í 1987 varð farið undir stór verkevni við innspræningum av vatni á Ekofisk feltinum og í 2000 varð somuleiðis farið undir hetta á Eldfisk feltinum.

»Hvønn dag verður mótsvarandi næstan ein millión tunnur av vatni sprænt inn í olju- og gasskeldurnar í tí Størra Ekofisk Økinum,« greiðir Lars A. Takla frá. »Hendan innspræningin av vatni í reservoir'ini er høvuðs orsøkin til ta positivu gongdina við tilfeingi og framleiðslu tey seinnu árini.«

Í fjør varð so Ekofisk Growth verkætlanin góðkend av myndugleikunum. Hendan verkætlan umfatar ein nýggjan keldupall, boring av 25 brunnum og øking í framleiðslu orkuni fyri alt feltið. Verkætlanin skal betra útvinngar ratuna frá Ekofisk enn einaferð.

»Aktuellar langtíðar útrokningar yvir tilfeingið í Ekofisk reservoir'inum vísa 8,7 milliardir tunnur, harav 6,9 eru olja. Í 1971 varð hildið at 21 prosent av tí tá metta reservoir virðinum (roknað í olju) varð útvinningarført. Ídag verður útvinningar ratan fyri Ekofisk feltið mett til 46 prosent og hetta kann hugsast at koma at hækka enn meira. Higartil hevur feltið framleitt meira enn 2,5 milliardir tunnur, harav 1,7 milliardir tunnur olju.«

Næststørsta felt í Størra Ekofisk Økinum er Eldfisk. Støddin á tí reservoir'inum verður mett til umleið ein triðing av Ekofisk reservoir'inum.

ConocoPhillips hevur ein 35,1 prosent lut í Ekofisk Komplexinum og er operatørur har vegna ConocoPhillips Norge. Felagið eigur eisini lut í øðrum milliard-tunnu framleiðandi feltum í tí norska partinum av Norðsjónum; millum tey mest týðandi teljast Heidrun, Statfjord og Troll.

## Størsti foredlari

Men Lars A. Takla hevur eitt hjartasuff um skattin. Hann meinar at tann sokallaði 'serligi skatturin' sum Noreg leggur á oljufeløg hevur eina negativa ávirkan á menningina. Feløgini rinda fyrst vanligan partafelagsskatt upp á 28 prosent av øllum vinningi og harafturat 50 prosent av inntøkunum frá olju- og gassframleiðslu.

»Trupulleikin er at hetta hindrar serliga tey minnu feløgini í at mennast… Tað er ikki natúrligt hjá nøkrum at taka óneyðugar váðar á seg, og hetta er ikki minst galdandi fyri smærri feløg. Úrslitið av tí 'serliga skattinum' kann gerast at øll vilja halda seg meira til tað trygga og gera minni við nýskapan - og tað kann so aftur føra til at menningin gerst minni.«

ConocoPhillips vísa seg at gera nógv fyri at effektivisera í rakstrinum, sum tað framgongur av teimum íløgdum felagið hevur gjørt í eitt Onshore Drilling Center uttan fyri Stavanger. Her kunnu verkfrøðingar, jarðfrøðingar og onnur sita við væl uppkobblaðar teldur og fylgja arbeiðinum live á fleiri boripallum í senn, millum annað við hjálp av videomyndum. Harafturat er eitt visualiseringarrúm ið ger tað lætt at upp á sera stutta tíð analysera aktuellar við hollari visuellari hjálp afturvið.

»Vit arbeiða miðvíst við at minka talið á fólki úti á pallunum so nógv sum møguligt,« sigur Lars A. Takla. »Málið er at skapa upplivilsið av at vera á boristaðnum gjøgnum nýtslu av standard nútímans visualiseringar og samskiftis tøknifrøði. At lata tøknifrøðina fáa fólk at arbeiða saman í einum veruliga integreraðum teami.«

ConocoPhillips kallar seg eitt 'altjóða, integrerað orkufelag' og er sum slíkt triðstørst í USA, roknað eftir marknaðar kapitalisering, prógvaðum goymslum av olju og gassi og framleiðslu; felagið er størsti foredlari av olju og gassi í USA. Á heimsstigi, millum fyritøkur ið ikki eru kontrolleraðar av stjórnum, hevur ConocoPhillips áttandu størstu prógvaðu goymslur av olju og gassi og er heimsins fjórð størsti foredlari.

Felagið hevur høvuðsstøð í Houston, Texas, og hevur virksemi í meira enn 40 londum. Tilsamans um 39.000 fólk hava starv hjá ConocoPhillips og ognir felagsins eru sambært ársroknskapin verdar umleið 530 milliardir krónur. Tann samlaða netto sølan liggur í krónum um 28 milliardir árliga, og felagið er listað á New York Stock Exchange.

Tey fýra høvuðs virksemis økini hjá ConocoPhillips eru: leiting eftir og framleiðsla av kolvetni; foredling, marknaðarføring, veiting og flutningur av kolvetni; samling, prosessing og marknaðarførsla av natúrgassi; framleiðsla og distributión av kemikalium og plastum.

Í Norðurlondum og nógvastaðni í Europa er ConocoPhillips alment kent gjøgnum bensinstøðir undir merkinum Jet.



*Visualiseringar útbúnaður ger tað möguligt at skjótt fáa eina mynd av einari aktuellari stöðu hvar enn í heiminum tað skal vera.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

## West Navigator skal bora við Ormin Langa



*Hilda Waaler, Public Relations Manager, Smedvig.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

**Smedvig vinnur milliarda sáttmála frá Shell men vil eisini gjarna koma aftur til nýggjar avbjóðingar á tí føroyska landgrunninum**

FRÁLANDAVINNA
*Búi Tyril, tyril@PRnewsMedia.com*

Norske Shell og Smedvig hava undirskrivað eitt ætlanarskjal um uppgávur til boriskipið West Navigator við gassfeltið Ormen Lange í Norska Havinum, upplýsir Smedvig. Uppgávan umfatar boring av átta djúpvatns brunnum á umleið 900 metra dýpi, við optiónum upp á fýra brunnar afturat. Sáttmála virðið í tí tryggjaða partinum av avtaluni er mett til umleið 1,1 milliard krónur. Arbeiðið skal eftir ætlan byrja í seinnu helvt av 2005. Boritíðin fyri tann tryggjaða partin av avtaluni er mett til 740 dagar, meðan tíðarskeiðið fyri optiónirnar kann vara upp til eitt ár.

»Sáttmálin við Shell tryggjar West Navigator langtíðar arbeiði og staðfestir positiónina hjá Smedvig innan djúpvatns boring í harðførum umhvørvi,« viðmerkti Kjell E. Jacobsen, Chief Executive Officer, Smedvig. »Hesin sáttmálin er eitt týðandi stig í langtíðar menningini av Smedvig,« legði hann afturat.

Smedvig er ein frálanda boriveitari við høvuðsstøð í Stavanger. Felagið veitir boring og keldu tænastur í Norður Atlantshavi og í Suðureystur Asia, og hevur ein flota upp á tríggjar nýmótans boripallar umframt eitt boriskip og tíggju atstøðupallar.

Smedvig er ikki heilt ókent í Føroyum í og við at boriskipið West Navigator hevur royndarborað her. Tað er heldur ikki óhugsandi at West Navigator verður leigaður hendan vegin av nýggjum tá royndarboringar byrja aftur.

»Føroyar eru eitt ótrúliga spennandi umráði,« segði Hilde Waaler, ið er Public Relations Manager hjá Smedvig, við Sosialin. »Avbjóðingarnar eru harðar bæði hvat jarðfrøði og veðri viðvíkur, og tað hóskar til okkara førleika.«



Statoil
- serkunnleiki í Norðuratlantshavi



PHILLIPS 66
Shell
PETRO-CANADA
STATOIL

petur & petur • +298 320870